# EINSAMUR RITHØVUNDUR SKELKAR

LEMJANDI ANGIST, KLAUSTROFOBISK SMÁBORGARLIGHEIT OG SKEIKLAÐUR SEXTØRVUR ER NAKAÐ AV TÍ, RITHØVUNDURIN **AGNAR ARTÚVERTIN »TRÝSTIR UPP Í FJESIÐ«** Á LESARANUM Í NÝGGJUM STUTTSØGUSAVNI, SUM SAMSTUNDIS LANGAR ÚT EFTIR FØROYSKUM BÓKMENTUM



**PORTRETT**

Anna V. Ellingsgaard
anna@sosialurin.fo

Seinast, hann gav eina bók út, fleyg ein østur ummælari í krovið á honum, kallaði hann barnalokkara, og ávaraði staðiliga lesaran um ikki at stuðla slíkum fúlum, pedofilum og svínskum lesnaði á føroyskum.

Hørðu ákærunar hava tó ikki tept 30 ára gamla rithøvundan Agnar Artúvertin. Í næstum gevur hann út stuttsøgusavnið *Revapassarin*, har hann innleiðandi kunngerð, at »eg skal trýsta alt upp í títt fjes«, samstundis sum hann vónar, at savnið kann verða eitt øðrvísi ískoyti til einsháttaðu sosialrealistisku føroysku bókmentirnar.

Spurdur, hvat hann meinar við, leggur Agnar Artúvertin ikki fingrarnar ímillum

– Føroyskir rithøvundar skulu tora at hava marruna, tora at lata seg taka av ræði kensluliga og hyggja beint í eyguni á teimum bangnu, krúpandi, og svíkjandi sosial-realistisku djevlunum og gera upp við teir. Tað er tað, eg vil trýsta upp í gronina á lesararnum – deyðan, ræðsluna og marrudreymar.

## Lekjandi einsemi

Í søgunum í *Revapassarin* verður óhugnin manaður fram í einsemiskenslu, skeiklaðum sextørvi, panikkanføllum og truplu samveruni millum menniskju. Ikki at skilja sum oyðileggjandi kreftir, men heldur sum ein máti at finna inn til sín sjálvs. Serliga er tað einsemiskenslan, sum er lekjandi, tí sambært høvundanum er tað onki minni enn ein deyðadómur at lata seg ávirka av øðrum. Heilt ítøkiliga letur hann hetta koma til sjóndar í heitissøguni *Revapassarin*, ið byggir á søgnina um vampýrin Drakula.

– Í hasi søguni kann tað at bíta ein, so hann blívir líka sum tú, tulkast sum menniskjalig sambond – at tað er ónt at ávirka hvønn annan ella koma hvørjum øðrum við, sum tað ofta verður rópt, sigur Agnar, sum ikki dylur yvir, at søgan er hansara reaktión móti stóra dentinum, sum í dag verður lagdur á felagsskap sum tað týdningarmesta av øllum.

– Tað eru fólk í okkara samfelagi í dag, sum eru harubangin fyri at vera einsamøll, tí tey hava eina smildraða sjálvsmynd og yvirliva ikki uttan onnur. Tað er syrgiligt at lesa í bløðunum um hesa trá eftir felagsskapi, sum hevur form av sexuellum frælsi, sigur Agnar, sum hinvegin heldur at einsemi og cølibat er gott og sunt fyri likam og sál.

Og kanska er okkara avskeplaða fatan av frælsi júst orsøkin til, at so nógvir av persónunum í *Revapassarin* eru so kryplaðir seksuelt, sálarliga og sosialt?

– Nei, ikki beinleiðis. Løgnu sexsenurnar eru hugsaðar meir humoristiskt ella poetiskt. Annars eri ikki samdur í, at mínir persónar eru kryplaðir. Tú kallar teir kanska kryplaðar, tí teir ikki passa inn í okkara yvirflatiska, keðiliga og sexualiseraða samfelag, men eg haldi teir vera nógv normalari enn tey flestu, sigur rithøvundurin og nevnir ræðusøguna um óttarið ella panikkanfall sum dømi.

– Óttarið sprettir úr innantómum sexualiteti og ræðsluni fyri einsemi og er tí ein nátúrlig avleiðing av samfelagsliga tómleikanum.

## At liva tvær ferðir

Eins og fyri rithøvundan sjálvan, bjóðar skaldskapurin seg ofta fram sum ein máti, hansara fiktivu persónar royna at handfara veruleikan. Longu sum barn rýmdi Agnar Artúvertin inn í sín egna heim av løgnum tekningum og yrkingum, tí hann ofta kendi samveruna við onnur sum ógvusligan ágang og treivst best einsamallur.

– Í hesi dreymaverðini blivu allar mínar upplivingar og royndir avskeplaðar, greinaðar og tulkaðar, áðrenn tær rukku tilvitskuni. Uppá tann mátan kanst tú siga, at skaldskapurin ól meg upp, sigur hann.

Eisini í hansara søgum gongur skaldskapurin aftur sum gjøgnumgangandi tema, bæði formliga sum spegilstekstir inni í søgunum og innihaldsliga við at persónarnir ofta fáast við skaldskap so ella so.

– Tá eg skrivi um persónar, sum eisini skriva ella yrkja, er tað ein máti hjá mær at kava enn djúpri og fáa fleiri sjónarhorn, bæði á meg sjálvan og á mínar persónar. Tað er ein erligur máti at skriva uppá, haldi eg, tí tá letur tú persónarnar, sum tú hevur skapt, koma tær nær, heldur enn at halda teimum í ironiskari og bangnari frástøðu ella lata teir vera bundnar av veruligum umstøðum.

Slík frástøða skapar ikki bara keðiligan, fátækan og skallutan skaldskap, sambært Agnari Artúvertin. Í grundini er tað eisini ein háð móti góðum skaldskapi, sum eftir hansara tykki er veruligari enn veruleikin. Millum annað tí skaldskapur gevur okkum enn ein møguleika at tulka og skilja tað, sum hendir okkum.

> At skriva er sum at liva dupult, tí tú sleppur at uppliva hendingar umaftur og fáa nýggjar og aðrar royndir av teimum. Tað er eisini tí, eg skrivi

– Onkur hevur sagt, at tað at skriva er sum at liva tvær ferðir ella liva dupult, tí tú sleppur at uppliva hendingar umaftur og fáa nýggjar og aðrar royndir av teimum. Tað er eisini tí, eg skrivi. Eg fái ikki latið vera.

## Skírdur barnalokkari

At tað kann hava sín prís at lata fiktivar persónar koma so tætt at høvundanum, mátti Agnar Artúvertin sanna, tá hann í vár gav út yrkingasavnið *Jahve kemur aftur*, har eitt 'eg' luftar síni trongd at nerta ósømiliga við smábørn. Hetta fekk so ilt í rithøvundan Ólav í Beiti, at hann heldur enn at ummæla savnið,

▶